


Tokkin til málið drívur verkið

ur, sjúkur elvdar av hita, sjúkur í landgognunum, sukursjúka, fiti, sjúkur í skjaldkertlinum, føðsla, trotsjúkur og sjúkur í livur og gallræsum).

Í at siga øllum førum havi eg við tøkk tikið eftir viðmerkingum og ráðum teirra.

Fyri munagóðan stuðul til reinskrivingina av pørtum av handritinum eftir hond míni takki eg Føroya Fiskimannafelagi, Føroya landsstýri, Føroya maskinistfelagi, Føroya Motorpassarafelagi, Føroya reiðarafelagi, Landsfelagsskapi Føroysku Fiskivinnunar, Skipara- og Navigatørfelagi og Tryggingarsambandinum Føroyar.

Til at kunna meg við tað nýggjasta, ið tá var, var eg í 1979 við studningi frá landsstýrinum eina ferð í U.S.A., har vitjaðir vóru teir stóru høvuðsskúlarnir bæði á eystur- og vesturstrondini umframt hin frálíka góði skúlin í Baltimore, tann einasti av sínum slagi í heimi.

Myndirnar eru í flestum førum fingnar ella leigaðar úr útlendskum bókum, og takki eg fyri loyvi at nýta tær.


Hjartaliga takki eg konu míni, *Tove Jagt*, yvirlækna, sum ikki bert hevur lisið alla bókina, borið tað reinskrivaða saman við handriti mínum, gjørt dygdargóðar viðmerkingar, hjálpt mær við myndatilfarinum at fáa tað inn, har ið tað hóskaði best, men eisini saman við mær hevur lisið allan rættlesturin. Umframt hevur hon saman við syni mínum, Høgna Debes Joensen, landslækna, sum eg her veiti tøkk, gjørt seinastu deildina: Leiðbeining um nýtslu og verðing (t.e. inngávu) av heiliváqum.

At enda verður *Emil Olsen* fil. dr. h.c., bókaútgevari, takkaður fyri, at hann hevur tikið upp á seg ta sera kostnaðarmiklu útgávuna av bókini.

Fegin hevði eg verið, vildu fólk, ið lesa hesa bók, vent sær til mín um brek, tey halda vera í henni, mest málsliga. Tí ógvuliga væl kann tað vera, at eg — hóast eg havi roynt bæði at lurta og leita væl — havi mistikið meg viðhvørt. Og helst er til hópur av góðum máli, eg eri ikki komin fram á«, sigur rithøvundin í formælinum.

Tað mesta av arbeiðinum í sambandi við bókina er gjørt hjá E.O. Prent á Velbastað. Janus Kamban hevur gjørt permuna, og bókin er prentað hjá Krips Repro í Hollandi.

Bókin kostar 780 kr. og er hon góðkend av Føroya landsstýri at verða nýtt í undirvisingini á føroysku sjómansskúlum og sum læknabók umborð á føroyskum skipum.



3. mynd: *Beinagrindin.*

Hanus Debes Joensen, sum í dag er 76 ára gamal, hevur brúkt tað mesta av síðstu 10-15 árunum at skriva hetta stórverkið av eini læknabók. Hann byrjaði so smátt at gera fyrireikingar til bókina miðskeiðis í 70-unum og hevur síðani tá, og serliga aftan á at hann fór úr starvinum sum landslækni 1. januar 1980, brúkt ein stóran part av tíð síni til hetta krevjandi arbeiði.

Vit hava spurt hann, hvussu tað bar til at hann í heila takið hættaði sær undir slíkt stórarbeiði.

Hanus D. Joensen: — Nú hevur læknafrøðin verið mitt livsstarv og tá mín áhugi fyri føroyska málinum eisini er sera stórur, so var tað náttúrligt at fara undir hetta arbeiði.

Hanus D. Joensen dylur ikki fyri, at tað er stórur tørvur á bókum á føroyskum máli innan tey flestu fakøkini. Sjálvur hevur hann fyrr skrivað eina bók um alisfrøði, eisini á føroyskum. So tað er ikki minst áhugin fyri málinum, sum er drivmegin hjá Hanusi.

Uppá fyrispurning hvussu er statt við føroyskum orðum innan eitt nú læknafrøðina, sigur hann, at tað er ótrúligt sum tað er nógv til av góðum føroyskum orðum. Sjálvur hevur hann verið dagligur gestur á seðlasavninum á Debesartrøð, har meira enn 1 mill. føroysk orð eru savnað.

— Hetta savnið hevur verið mær ógvuliga hent og vil eg eisini mæla øðrum til at brúka tað. Og sjálvur er Hanus Debes Joensen ikki givin við at leita hetta virðismikla orðasavn upp, tí hann tekst framvegis við at týða og skriva bøkur. Longu nú liggur nógv eftir hann, sum er týtt til føroyskt, men sum enn ikki er útgivið. Har er m.a. ein týðing eftir kenda rithøvundan Wilde og eisini hevur hann týtt stórverkið Cameron til føroyskt. Hetta verk telur meira enn 1000 blaðsíður og fer væntandi eisini at koma út í bók.

— *Hvat heldur tú so um útgávuna av føroyskum bókum annars?*

— Tað er gleðiligt, at fólk royna at geva bøkur út á okkara egna máli, men tíanverri má eg siga, at oftani verður ov lítið hugsað um góðskuna. Okkum tørvar eisini fleiri originalbøkur á móðurmálinum.

jan



Emil Thomsen er »still going strong«. Ikki færri enn tvey stórverk hevur hann staðið fyri útgávuni av í ár, nevniliga Kirkjubøstólarnir og nú Læknabókin, sum báðar teljast millum tungvektararnar í okkara enn so ungu bókmentasøgu. Spennandi verður at siggja, hvat tað næsta verður, sum Bókagarður kemur við.